Toll- og Skattstova Føroya Sandoyar Øki

Fyribilsstarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki, er fyribilsstarv sum skrivstovufólk leyst at søkja til setan skjótast tilber og fram til 1. oktober 1999.

Arbeiðsuppgávur
Avgreiðsla og ráðgeving í tolli, avgjøldum, meirvirðisgjaldi, skatt og stuðulsskipanum v.m. Harumframt bókhald og inkvirering av skipum.

Førleikakrøv
Tannn, sum settur verður, skal í minsta lagi hava HH-útbúgving ella líknandi prógv, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Í sambandi við vaktarskipan aftaná vanliga arbeiðstíð krevst, at umsøkjarin býr í Sandoynni.

Setanarviðurskiftir
Løn og setanarviðpurskiftir eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum og ummælum skulu sendast Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki, 240 Skopun, innan 15. juni 1999.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki á tlf. 361588.

Um stovnin:
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattaloggávuna og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær sjey økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík, og tvær í Tórshavn, røkja raksturin. Í Sandoyar Øki starvast 2 fólk.

Trøð á Hvítanesi
uml. 13.000 m² við ástandandi frítíðarhúsi til sølu, um hóskandi boð fæst. Trøðin liggur við landsveg.

Áhugaði biðjast ringja
Tlf. 31 23 37

BETONG SAGING!
Við mest framkomnu útgerð saga vit...
ALLAR SKURÐIR (dýpi 55 cm t.d.: HURÐA-/VINDEYAOP o.a.
EISINI HOL upp til 30 cm/diam, t.d. til rørleiðingar, ventilatión o.a.
Geva fegnir **TILBOÐ!** – bæði vanl. húsaánarum, virkjum, byggi- og vvs-fyritokum
FØROYA BETONG SAGING v/ Hjaltur Tausen
Postsmoga 67 · Gerðisvegur 620 Runavík
Tlf. 447543 • Fax 448898
Koma um alt landið!

sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið í **sosialinum**

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Dagstovnurin í Kvívík

Søkt verður við hesum eftir pedagogum til »Dagstovnin í Kvívík«, at byrja frá 15. august 1999.

Eitt starv fulla tíð (40 tímar) og eitt starv 3/4 tíð (30 tímar).

Umsóknir, við møguligum ummælum, skulu verða inni í seinasta lagi 15. juli 1999 og stílast til Kvívíkar Kommunu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðarin á stovninum, telefonnummarið hjá stovninum er 421660.

Kvívíkar Kommuna

Frá REYNI SERVICE
Mekaniski verkstaðurin er stongdur frá týsdegnum kl. 12.00 til og við hósdagin vegna skeiðvirksemi



Vegurin Langi-188Hoyvík-Tlf. 313040

Lestur á Náttúruvísindadeildini

Støðisútbúgvingin
Í summar verður tikið upp til 2 ára lívfrøðiligu støðisútbúgvingina, sum er grundarlag undir BS-útbúgvingum á Náttúruvísindadeildini og framhaldsútbúgvingum í útlondum.

Fakliga støðið í støðisútbúgvingini er sum fyri 2 ára byrjanarlestur á útlendskum universitetum. Undirvíst verður í evnum innan lívfrøði og evnafrøði, har føroysk viðurskifti verða tikin inn í undirvísingina. Stuðulslærugreinir eru í teldufrøði, hagfrøði og støddfrøði.

BS-útbúgving
Hetta er 1 ára útbúgving oman á støðisútbúgvingina, har serligur dentur verður lagdur á lívfrøði í havinum. BS-útbúgvingin endar við eini seruppgávu, har ein arbeiðir við einum valdum evni í umleið 3 mánaðir.

Eitt hold byrjar BS-útbúgving í summar, og fólk við hóskandi fakligum fortreytum kunnu melda seg til lesturin, sum verður 1999/2000.

Stakgreinalestur
Møguleiki er fyri at innskriva seg til einstakar lærugreinir, ið undirvíst verður í á útbúgvingum, sum eru í gongd á Náttúruvísindadeildini. Hetta kann td. brúkast sum ein møguleiki til at dagføra partar av síni vitan.

Upptøkutreytir
Upptøkutreyt til støðisútbúgvingina er støddfrøðiligt studentsprógv við B-stigi í støddfrøði, evnafrøði og alisfrøði. Fólk við øðrum fortreytum við tilsvarandi kunnleikastigi í nevndu lærugreinum kunnu verða tikin upp eftir meting.

Upptøkutreytin til BS-útbúgvingina er lokin støðisútbúgving ella aðrar tilsvarandi fakligar fortreytir. Umsóknir til stakar lærugreinir verða mettar fyri seg.

Aðrir møguleikar
Bæði aftan á støðisútbúgving og aftan á BS-útbúgving ber til at fara uttanlands at útbúgva seg til hægri førleikastig sum td. cand.scient. ella MSc.

Meir at vita
Meir fæst at vita við at venda sær til Náttúruvísindadeildina ella við at kaga í heimasíðuna á http://www.setur.fo/nvd/

Umsóknarbløð og -freist
Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, Nóatún 3, FR-100 Tórshavn. Tlf. 315306, fax 316844. Umsóknarfreistin er 1. juli 1999.

Náttúruvísindadeildin
Nóatún 3
FR100 Tórshavn